# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Egg ella ungi

Bíða hevur verið við stórum spenningi eftir, at tingið skuldi verða kallað saman til tess at viðgera ein kreppupakka frá landsstýrinum. Løgmaður hevur gjørt vart við, at talan ikki verður um ein kreppupakka, men heldur um ein vøksturs- ella menningarpakka. Okkurt smávegis er komið út um ætlaðu tiltøkini. Tað tykist sostatt greitt, at broytingar verða í rentustuðulskipanini eins og tað nú er vorðið greitt, at landsstýrið hevur havt fundir við umboð fyri almenn fakfeløg um at strika ta lønarhækking, sum eftir galdandi sáttmálum á almenna arbeiðsmarknaðinum, skulu koma í gildi tann 1. oktober í ár.

Tað tykist tó óvist, hvørja lagnu henda ætlan fær, tí í gjár boðaði talsmaðutin hjá fimm stórum yrkisfeløgum á almenna arbeiðsmarknaðinum frá, at tey alment løntu í Føroyum skulu ikki bera skrædlið einsamøll. Bakgrundin fyri hesi útmelding er, at almennu Føroyar komandi fíggjarár skulu rekast fyri sama krónutal, sum er galdandi í verandi fíggjarári. Skal hetta bera til, so er neyðugt at skerja almennu útreiðslurnar. Karmarnir fyri komandi fíggjarár skulu ásetast í hesum døgum, so tað stendur uttan iva nógv á samgonguni. Næstu dagarnir ella vikurnar vera tískil avgerandi og vit fáa at síggja, um samgongan megnar henda setning.

Hetta at seta almennar lønir niður í einum sáttmálaskeiði er royn áður. Hvørt hetta í sjálvum sær ávirkaði búskapin rætta vegin eru fleiri meiningar um. Hin vegin munnu valla vera fleiri meiningar um, at ein slík loysn politiskt kann gerast ein dýr søga fyri landsstýrisflokkarnar, um loysinin ikki fær fulla undirtøku frá avvarandi yrkisfeløgum. Um avvarandi almenn yrkisfeløg fáa sínar treytir eftirlíkaðar er støðan ein onnur, men støðan er kortini ikki uttan trupulleikar. Eitt so radikalt tiltak á almenna arbeiðsmarknaðinum fer helst at ávirka støðuna á privata abeiðsmarknaðinum at elva til órógv á hesum øki. Eydnast tað almenna arbeiðsgevaranum at fáa lønirnar niður við t.d. 3%, so fara privatu arbeiðsgevararnir helst at royna tað sama á sínum økjum. Spurningurin er um alt hetta gagnar royndunum at minka um ta kreppu, sum nú er eygsýnilig sjálvt fyri politikarar og embætisverk, sum annars javnt og samt hava bagatelliserað kreppuna.

Tá tingið fór í summarfríð, varð boðað frá, at landsstýrið fór at kalla løgtingið saman aftur hálvan juni at viðgera uppskot um krepputiltøk og at áseta karmarnar um fíggjarlógina fyri 2010. Í sama viðfeingi vórðu nevndir nog nakrar av teimum broytingum, ið skuldu minkað um almennu útreiðslurnar. Almenningurin fekk at vita, at einki øki varð friðað og at halgineyt í hópatali skuldu slaktast.

Í gjár var juni hálvrunnin, men enn er einki hent. Leysasøgurnar í politiska umhvørvinum um komandi kreppupakkan hava ikki trotið og torført er at skilja millum veruleika og heita luft. Alt hetta kundi bent á, at ósemja er í samgonguni um ein komandi kreppupakka, serstakliga um fíggjarkarmarnar fyri 2009. Tíðin gongur, lítið og einki fæst at vita og óvissan millum manna og í vinnuni er stór. Hetta er ikki gott fyri álitið á politisku skipanina og nú er uppá tíðina, at kreppupakkin ella vakstrarpakkin verður egg ella ungi.

**Sosialurin**

## TELTAVÍK og TELTAVÍKSHÓLMUR?!?

**EYÐUN Á BORG**



Á Borg á Argjum á blóðgevadegi 2009

TELT: Nú eru nógvar summarstevnur (t. d. Fjarðarstevnan, ikki Fjarða-) og onnur summartiltøk.

Í heilum hoyra vit um TELT, bæði munnliga og skrivliga. Vørpini tosa um telt, kunngerðir og lýsingar brúka orðið, telt, og á skeltum stendur hatta orðið eisini skrivað, t.d.: Dansur í teltinum.

Man telt vera komið úr enskum, ella ---??

TJALD: Í øldir hevur tað itið TJALD á føroyskum, stutt, vakurt, snøgt.

TJALDAVÍK og TJALDAVÍKARHÓLMUR: Staðanøvn í Suðuroy, søguligt stað. Vónandi fer eingin at siga TELTAVÍK!?!

Góðu tit, øll somul! Brúkið nú tað føroyska orðið, TJALD!!

E.S.: Orki ikki at gera viðmerkingar til SPROKSTRIKUNA í summar, kanska seinni!?!

Gott málsummar!

## Hjartaliga tillukku við Bókasavninum!

**FRÍÐTÓR DEBES**



kunningarleiðari

Dagurin 7. juni var her heiman á Sandi ein merkisdagur, har nógv fólk leitaðu sær oman á Mørkina Miklu fyri at vera við til vígsluna av Sands Bókasavni. Og dagurin var hátíðarligur. Nógv ymiskt var á skránni s. s. røður, guitarspæl, avdúkan av tveimum málningum, upplestur av børnum, ábit o.a. Ein væla løta.

Eg vil nýta høvi at ynskja Sands kommunu og Sandoynni sum heild hjartaliga tillukku við nýggja og sera snotiliga bókasavninum, ið stendur mitt í Sands bygd.

Á skeltinum uttanfyri stendur »Blindur er bókleysur maður!« Og er hetta so satt so satt. Tað er sera gott fyri eina oyggj sum Sandoynna at hava fingið eitt slíkt bókasavn – ið uttan iva kemur at skapa gleði fyri nógv menniskju í langa tíð fram. Stóra tøkk skal Daniella Olsen hava fyri hesa sera stóru og snotiligu gávu.

Góða eydnu við Bókasavninum!

## At vera fátækur og tykkin

**PALLI DALSGAARD**

Gamalt var, at tað nyttar ikki at vera fátækur og tykkin. Tað kann ikki sigast um okkum, at vit eru tykkin. Tí klægurnar um fátækdømir hava ikki trotið hesa síðstu tíðina. Tað er ikki eiti á, sum tað hevur ljóðað um tað neyðstøðu, vit pensiónistar eru í. Er nú neyðin so, sum hon ljóðar? Hon er í øllum førum torfør at fáa eyga á.

Tað er ikki rætt at lata standa til og at landið skal taka um endan. Vit mugu øll somul hjálpa til, tað gera vit einans við at spenna lívreimina munandi inn. Tað ljóðar hart, men vit hava verið forkelað í den grad í áravís. So tað verður torført at venja seg við sparsemi sum vónandi ikki kemur at taka ov langa tíð. Kreppan er ikki einans her hjá okkum, hon er um allan heimin, og vit mugu øll somul hjálpa til fyri at koma burtur úr henni.

Kann minnast, tá seinri heimsbardagi brast á, at nakað av neyðsinjarvøru var skamtað. At farbróðir setti uppslag á veggin í handlinum, har hann bað fólk um at spara matvøru. Yvirskriftin á uppskagnum ljóðaði: »Hann, ið ikki sparir, tá hann hevur, hevur einki tá hann krevur«. Hendan áminning hevur líka nógv at siga í dag, sum hon hevði tá.

At seta í bløðini at pensiónistar í Føroyum líða neyð er bæði synd og skomm. Vit skulu minnast til, at bløðini koma ikki einans út her hjá okkum. Tey koma út langt út um landoddarnar. Tað eru tíverri nøkur okkara millum, sum ikki fáa ta røkt, tey hava fyri neyðini. Vónandi verður tað rættað sum skjótast.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.